# psaveiðan gongur ndoynna



*Meðan minni hevur verið at gjørt á flakavirkinum hjá Sandoy Seafood í Skopun í seinastuni, hevur verið frægari hjá TG Seafood í Hvalba*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

fiskin bíligari enn tað, sum fiskurin annars kostar á marknaðinum.

– Men skipið er heimahoyrandi í oynni, og tí passar tað teimum eisini væl, at veiðan verður løgd upp í oynni. Vit eru sjálvsagt sera fegin um tað samstarv, vit soleiðis hava við skip og manning, sigur Magnus Jespersen.

## Frægari í Hvalba

Delta Seafood hevur eisini sín leiklut í virkseminum hjá TG Seafood í Hvalba.

Magnus Jespersen, stjóri, sigur, at í Hvalba hevur verið væl frægari við fiskaarbeiði, tí skipini, sum landa til virkið, eru fleiri í tali.

– Í Hvalba er rættiliga støðugt arbeiði, og í gjár vóru partrolararnir Hamranes og Breiðanes inni við 240.000 pundum av upsa.

Hini skipini, sum eru heimahoyrandi í Hvalba, og sum soleiðis eisini eru partur av ráfiskagrundarlagnum undir TG Seafood, eru Steintór og Sjagaklettur.

Meðan Magnus Jespersen harmast um lítla virksemi, sum verið hevur í Sandoynni í heyst, fegnast hann um, at væl meiri hevur verið at gjørt á virkinum í Hvalba

## Dugnaligir menn

Leggjast kann aftrat, at tað er ikki bara sum at siga tað at reka fiskavirkisvinnu á fleiri støðum, soleiðis sum Magnus Jespersen og hansara dugnaligu fólk gera á Tvøroyri, Hvalba og í Skopun.

Men hetta ber til, tá vilji, treysti og dugnaskapur eru til steðar, og tá umstøðurnar annars hátta sær so nøkulunda.

> **... Eysturbúgvin leggur at kalla hvørja upsalast upp í Sandoynni...**
> MAGNUS JESPERSEN

*vilmund@sosialurin.fo*

---

# ini at gevast í Skopun

millum Vinnumálaráðið, alivinnuna og Fiskaaling um lívfiskin. Úrslitið av hesum er, at ein samarbeiðsavtala nú er gjørd millum Fiskaaling øðrumegin og norska felagið SamloBreed hinumegin um, at kynbótaarbeiði og framleiðsla av rognum skal halda fram í Føroyum – í tøttum samstarvi millum partarnar.

Jóhan Dahl sigur, at hann helt avgerðina um at niðurlaga kynbótaarbeiði í Føroyum vera skeiva.

– Tí gjørdi eg av at steðga hesum ætlanum, leggur hann aftrat.

Herfyri sendi so Fiskaaling út tíðindaskriv um samarbeiðsavtaluna, sum Fiskaaling og SamloBreed hava gjørt.

Avtalan ber í sær, at SalmoBreed tey næstu trý árini skal veita Fiskaaling útvald rogn, sum eru kynbøtt eftir teimum ynskjum, sum føroyska alivinnan hevur.

Henda avtala kemur longu í vetur. Fiskaaling fer at klekja rognini við Áir og síðani ala yngulin til lívfisk á støðini í Skopun, til hann verður strokin og rognini seld, fyrst og fremst til føroysku alivinnuna.

Í fráboðanini verður sagt, at avtalan millum partarnar fyribils er galdandi í fýra ár, og føroysku alararnir kunnu vænta sær tey fyrstu rognini av hesi framleiðslu á heysti um tvey ár.

## SalmoBreed fegnast

– Avtalan tryggjar føroysku alarunum tilgongd til fremsta kynbótaarbeiðið í heiminum og verður samstundis ein trygd fyri góðari heilsustøðu.

Tað sigur stjórin í Samlo-Breed.

Hann leggur aftrat, at tey í Noregi eru ógvuliga spent upp á hetta samstarv, og tey siga seg vera sera fegin um, at Fiskaaling júst hevur valt tey at samstarva við.

– Vit síggja fram til eitt spennandi samarbeiði. Fiskaaling hevur í dag ein marknaðarpart í Føroyum á 50-75%, og vit í SalmoBreed skulu viðvirka til at styrkja teirra støðu á føroyska marknaðinum, sigur stjórin.

Eisini stjórin í Fiskaaling, Kristian Petersen, fegnast um avtaluna.

## Meira málrættað

– Vit fegnast eisini um, at avgerðin um rognaframleiðslu í Føroyum endaliga er tikin, soleiðis at vit kunnu fara meira málrættað til verka. Vit ivast ikki í, at vit hava fingið eina góða avtalu við eitt av fremstu kynbótafeløgum í heiminum. Hetta fer at hava stóran týdning fyri alivinnuna frameftir. Okkara vón er, at føroyska alivinnan fer at taka væl undir við okkara framleiðslu, sigur Kristian Petersen, stjóri í Fiskaaling.

Við hesum er so allur ivi fyribils burtur um, hvørt kynbótaarbeiði heldur fram í Føroyum ella ikki.

*vilmund@sosialurin.fo*



*– Vit fegnast um, at avgerðin um rognaframleiðslu í Føroyum endaliga er tikin, sigur stjórin í Fiskaaling, Kristian Petersen*